# MINNINGARGRUNNUR DÁNJAL NICLASEN

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2001 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, hin 20. juli 2001.

Umsóknarblað fæst við at seta seg í samband við Fiskasøluna, tel. nr. 345 345, og verður at senda til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen**
**c/o Føroya Fiskasøla**
**Mykinesgøta 5**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Hans Johannes á Brúgv, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær víðari útbúgving innanfyri føroyska fiskivinnu, eitt nú hvat viðvíkur:*

1. *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*
2. *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
3. *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
4. *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*

**PRENT?**
...nýggjasta tøknin og gott handverk geva besta úrslitið...
Spf.
**HESTPRENT**
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

**FAROESE JEWELLERY**




**FAROESE MUSIC**



A wide selection of all kinds of music - from the old Faroese ballads to the newest pop and rock.

**PHOTOGRAPHY**



Have your photos developed here. We have everything you need: film, cameras, batteries, etc.
1 HOUR PHOTO DEVELOPING
Welcome to
3arin
SMS Shopping Centre
Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com

Lesið Sosialin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo












# Útbjóðing

Fyri Kongshavnar Barnagarð og Vøggustovu verður arbeiðið at gera grundøkið til nýggjan barnagarð byggibúgvi hervið boðið út alment.

Arbeiðið fevnir um grevstur, spreinging, planering og legging av høvuðskloakk.

Útbjóðingartilfarið fæst frá mikudegnum 04. juli við at gjalda kr. 5.000,- í veð á konto 413.260.7 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi mikudagin tann 04. juli og venda sær til Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Lisitatiónin verður fríggjadagin tann 20. juli í ár kl. 15.00. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**FUGLØ ARKITEKTAR**
Gerðagøta 12, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97
fugl-ark@post.olivant.fo

# Ólavsøku-framsýningin 2001

Listafelag Føroya skipar fyri ólavsøkuframsýning í Listaskálanum. Øll kunnu senda inn verk til ólavsøkuframsýningina.

Verkini skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juli. Saman við verkunum skal vera listi yvir tøkni, heiti og prís, um verk eru til sølu, og øll verk skulu vera týðiliga merkt samsvarandi listanum.

Tilmeldingarblað til framsýningina fæst í Listaskálanum.

Myndir undir glasi skulu hava rammu.

Listafelagið setir eina nevnd at skipa fyri framsýningini, og tilskilar sær rætt til at taka dagar í, hvussu úrval og samanseting skulu vera.

Listaskálin er opin mánadag-fríggjadag kl. 11-17. leygardag og sunnudag kl. 14-18.

**Listafelag Føroya**
Gundadalsvegur
postsmoga 1141
FO-110 Tórshavn
telefon 313579

# Svimjihylurin

Í tíðarskeiðnum 01.07.-01.08.2001 er svimjihylurin opin soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 19.00-20.45 |
| Onsdag | kl. 19.00-20.45 |
| Leygardag | kl. 15.00-17.45 |

**Vágs Býráð**



# Útferð í Stakkin

Sunnudagin 1. juli kl. 13.30, verður farið úr Tjørnuvík út í Stakkin. Teknið tykkum á hesum telefonnummurum:

tlf. 423353, 423528, 423401, 423556 ella 423365

har meir fæst at vita. Avmarkað luttøka.

**Staksnevndin**

# Bussferð til Íslands

## – vitjið grannar okkara fyri vestan –



Koyrt verður av Seyðisfirði yvir Egilsstaðir til Akureyrar har gist verður í 2 nætur. Hagani víðari til Reykjavíkar har gist verður í 3 nætur. Eysturyvir verður koyrt sunnanfyri og verður gist eina nátt við Laugarvatn. Síðstu náttina verður gist á Egilsstøðum.

Útferðir verða hvønn dag gjørdar út frá áðurnevndu støðum.

Føroyskur bussur og ferðaleiðari.

**Prísur úr kr. 7.495,-**

**Íroknað prísin:** Ferðin við Norrønu fram og aftur í 4 koyggjukømurum við WC/Bað, innivist á hotelli í dupultkamari og morgunmatur og døgurði á kvøldið. Allar útferðir í Íslandi.

Bílegging á

**SmyrilLine**
tlf. 34 59 00
e-mail: booking@smyril line.fo

**Bussferðir**
31 31 61

# Pedagogur

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Sambýlinum í Turiðargøtu 25, er eitt tænastumannastarv sum pedagogur leyst at søkja frá 01.08.2001 ella eftir avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Uppgávan er at arbeiða við fólkum við serligum tørvi og arbeiðstíðin fevnir um dag/kvøld/nátt og vikuskiftisvaktir.

Sambýlið er undir uppbyggjan og vænta vit at tú verður við til at skapa eitt trygt og mennandi umhvørvi saman við bú- og starvsfólkum. Starvið krevur at viðkomandi umsøkjari er opin fyri at síggja møguleikar ístaðin fyri forðingar í tí pedagogiska arbeiðinum.

Í løtuni búgva 2 fólk á sambýlinum, men er ætlanin at 3 fólk skulu flyta inn afturat í nærmastu framtíð.

Starvið er ætlað pedagogi, men um ongin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið fyribils sett fólki við aðrari viðkomandi útbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Finn Larsen ella Onnu Dalsgaard á tlf. 321068.

Skrivlig umsókn við prógvi og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10.07.2001 og sendast til:

**Sambýlið í Turiðargøtu**
Turiðargøta 25
FO-100 Tórshavn

FK Dr. Jakobsensgøta søknast eftir

# fólki til *Breyðskivuna*

**at byrja 1. september 2001 ella eftir nærri avtalu.**

**Arbeiðstíð:** Uml. 30 tímar um vikuna. Frí annan hvønn leygardag.

**Okkara krøv:** Fyrikomandi, kundavinarlig/ur, røkin, góð samstarvsevni og sjálvstøðug/ur.

**Løn:** Sbr. S&K sáttmálanum.

Skrivlig umsókn innan 11. juli 2001, mrkt. *Breyðskivan*.

**Nærri upplýsing:** Tlf. 31 13 20 / 21 75 93 Bo Møller

**KEYPSSAMTØKAN í Dr. Jakobsensgøtu**
**Boks 349 • FO 110 Tórshavn**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg